

*Ryberg, sum stovnaði Vágsbotnshandilin í 1768*



*Christian Rosenmeyer, annar av stjórunum í Vágsbotnshandlinum gjørdi litmyndir av Vestaruvág í 1778*



*Rybergs andi - við sínum fleyri av fyritakssemi, frælsi og heimsborgaraskapi - sveimar yvir hesum stað, og á torginum út ímóti sjónum stendur Nólsoyarpáll - sum blaðungur skal hava siglt við Rybergs skipum*



*Vágsbotnur um fyrra aldarskiftið*




*Nógv er broytt síðani Ryberg stovnaði handil fyri 235 árum síðani*

nevniliga hann, sum prentaði blaðið. Hann æt Jákup Jacobsen Baia og varð nevndur Jákup á Kamarinum. Í samrøðu, sum Poul Niclasen hevði við hann í 1916, sigur Jákup soleiðis frá:

*Tað var ein merkisdagur í Havn, tá fyrsta nr. av "Føringetidende" fleyg út um býin. Bløð vóru forkunnug í Føroyum í teirri tíðini; tað var so at siga eina "Berlingske", og hon kom sjálvsagt ikki til aðrar enn embætismenninar. Eg skuldi bera "Færingetidende" til teir haldarar, ið vóru her í Havn, og Niels legði mær eina við fyrst at fara til fútan við einum nr. Eg skøddi meg væl, fór sum álagt fyrst til fútan, hvar móttøkan ikki var víðari, og spelaði so avstað tað dýrasta eg var mentur. Tað ráddi jú um at fáa blaðið runt, áðrenn fútin hin gamli kom í tankar um at senda politistarnar eftir mær. Hvar eg kom, tyrptist fólk saman um meg fyri at frætta frá tí, ið stóð í blaðnum. Eg mátti brúka bæði bein og munn, og tá eg kom aftur í prentsmiðjuna og fór at taka stavirnar sundur, var eg deyðagivin.*

*Vóru tey enn mong, sum sýntu blaðnum vælvild, so var mótstøðan eisini stór. Soleiðis minnist eg, at ein plakat ein morgunin var sligin upp, og stóð á henni, at "Niels Winther átti at kastast oman av Bryggjubakkanum".*

Jákup á Kamarinum hevur ymiskt annað forvitnisligt at fortelja, og eitt nú leggur hann aftrat, at orsakað av tilfarstroti vórðu "valsurnar" gjørdar úr m.a. lími, siroppi og putursukri. Vit mugu sanna, at her er talan um eitt lop - frá siroppi í 1852 til teldu og alnót í 2005.

Við hesum orðum fari eg at ynskja Sosialinum, blaðsins starvsfólkum og blaðstjórn - og Føroya blað- og tíðindaheimi sum heild - tillukku við hesum nýggju húsum. Ein rithøvundur - Arthur Koestler - helt eina ferð fyri, at ein blaðstjóri er ikki skipari á einum marglætisbáti, men á einum krígsskipi. Niels Winther livdi upp til hetta krav, tá hansara skriving fekk afturhaldið at hótta við at blaka hann út av Bryggjubakka.

At Koestlers stolta krav er viðkomandi, eisini í Føroyum í dag, tykist ymiskt at benda á, eitt nú tað at okkara háttvirda løgting nú - rúma tíð eftir Ryberg og einahandilsavtøkuna - er farið undir at skerja okkara handilsfrælsi. Hetta er púra misskilt, tí handlar og bønhús hava vant seg við at virka lið um lið um somu tíð í sínámillum virðing og samljóði. Í eini tíð við vaksandi altjóðaagerð átti tingið at gingið tann øvugta vegin, økt um tað búskaparliga frælsið og minkað um forðingar, eitt nú fyri bryggjaravirksemi, so vit føringar nú kundu útflutt ta varu, sum Ryberg læt bretar fáa, eitt nú romm, ginn, genever osfr. Hvussu skulu vit annars fáa tað nógv eftirtráaða annað vinnulívsbeinið?

Tá ið løgmaður leggur fram stoltar víðsjónir um, at okkara land í 2015 skal vera millum heimsins mest framkomnu lond, hugsar hann neyvan um eitt dapurt, stirvið, uppsteðgað teokrati eftir iranskari fyrimynd. Eina ferð enn tillukku. Avbjóðingarnar tróta ikki. Men sjálvsagt vóni eg, at Jan Müller ikki verður tveittur út av Bryggjubakka.